# Lønarhækkanin á privata arbeiðsmarknaðinum sæst aftur

**Eftir, at almenni arbeiðsmarknaðurin hevur verið til samráðingar í heyst, er rættiliga sannlíkt, at lønargjaldingarnar í Føroyum verða enn hægri enn tær eru í løtuni. Hóttanin um stóru kreppuna í alivinnuni kann tó tálma hækkanin av lønargjaldingunum**

LØNARGJALDINGAR
*Páll Holm Johannesen*

Samanborið við fyrsta hálvár í fjør, so eru lønargjaldingarnar í Føroyum hækkaðar. Fyrsta hálvár í vórðu í alt 2.911,3 milliónir krónur goldnar í lønum, samanborið við 2.895,3 milliónir krónur fyrsta hálvár í fjør.

Einki er at ivast í, at lønarhækkanin á privata arbeiðsmarknaðinum er høvuðsorsøkin til hækkanina. Hevði tað ikki verið fyri kreppuna í alivinnuni, so hækkanin helst verið enn størri. Lønargjaldingar í alivinnuni er nevnliga lækkaðar við 13 % hetta tíðarskeiðið.

Í heyst skal almenni arbeiðsmarknaðurin til samráðingar, og nógv bendir á, at feløgini ikki fara eftir minni lønarhækkan, enn privati arbeiðsmarknaðurin fekk í fyrr í vár.



*Lønargjaldingarnar í Føroyum eru hækkaðar í mun til sama tíðarskeið í fjør. Høvuðsorsøkin er lønarhækkanin hjá privata arbeiðsmarknaðinum. Hóttanin um kreppu í alivinnuni kann tó tálma nakað av hækkanini í lønargjaldingunum*

*Mynd: Savnsmynd*

# Vit eru hálvt fimta túsund fleir enn í 1995

**Seinnu árini er fólkatalið hækkað á hvørjum ári. Nýggjastu hagtølini hjá Hagstovuni vísa, at fólkatalið framvegis hækkar. Tað búgva pr. 1.juli í ár í alt 48.117 fólk í Føroyum**

FÓLKATALIÐ
*Páll Holm Johannesen*



*Fólkatalið í Føroyum hækkar framvegis. Hagtøl frá fyrsta hálvári í ár vísa, at í alt búgva 48.117 fólk í Føroyum.*

Sambært seinastu hagtølunum hjá Hagstovu Føroya búgva í løtuni 48.117 fólk í Føroyum. Tølini eru grundað á hagtalstilfar fyri fyrsta hálvár í ár. Seinastu árini er fólkatalið hækkað á hvørjum ári.

Eftir at fólkatalið toppaði í 1989, tá 47.738 fólk búðu í Føroyum, gekk niðureftir, og botnurin var í 1995, tá 43.500 fólk búðu í Føroyum. Síðan 1995 hevur gingið framá, og nú fyrsta hálvárið av 2003 er lagt afturum eru vit farin uppum tey 48.000.

Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru bæði fleiri børn fødd, og nettotilflytingin til landið er størri. Fyrsta hálvár í ar eru í alt 343 børn fødd, og 284 fleiri fólk flutt til Føroya, enn flutt av landinum.

# Arbeiðsloysið er nú 2,7 %

**Framvegis er arbeiðsloysið í Føroyum rættiliga lágt, men hóttanin um hópuppsagnir í alivinnuni kunnu hava við sær, at talið av arbeiðsleysum hækkar komandi árið**

ARBEIÐSLOYSIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Seinasta fríggjadag boðaði leiðslan í ALS, at ALS-gjaldið frá 1.september í ár veksur úr 0,5 % til 0,75%. Ein av orsøkunum til hækkanina var, at fleiri føroyingar vóru blivnir arbeiðsleysir, og tí var útgjaldið størri enn væntað.

Nýggjastu hagtølini vísa, at arbeiðsloysið í Føroyum er vaksið við einum prosentstigi. Sama tíðarskeið í fjør varð arbeiðsloysið 2,6 % av samlaðu arbeiðsstyrkini, og í fyrsta hálvár í ár er talið 2,7 %.

Arbeiðsloysið er nógv lækkað, síðan tað var í hæddini í 1995, tá arbeiðsloysið var 14,7 %. Ymiskt bendir tó á, at møguliga fer arbeiðsloysisprosentið at hækka aftur. Fara virkir av knóranum, merkist tað rættiliga skjótt, tí prosenttølini eru so lítil í løtuni. Hóttanin um hópuppsagnir í alivinnuni kunnu skjótt hava við sær, at talið av arbeiðsleysum í Føroyum aftur fer skeivan vegin

# Mette Fønss aftur til Føroya

**Síðan skeiðini í Føroyum, hevur Mette Fønss arbeitt við at umseta eina bók, ið lærir fólk at leggja av at roykja. Bókin er sera vælumtókt í Skandianavia, og í løtuni liggur bókin nummar eitt á sølulistunum í Noregi**

ROYKING
*Páll Holm Johannesen*

Danska kvinnan, ið roynir at fáa føroyingar at leggja sigarettirnar á hillina kemur aftur til Føroya at halda fleiri skeið. Mette Fønss fer um mánaðarskiftið aftur at eggja føroyingum v at við gevast at roykja. Skeiðið verður í Havn í døgunum 31.7, 1.8, 2.8 og 4.8. Fólk kunnu boða frá luttøku á telefon +45 51 90 35 36 ella á heimasíðuni www.easyway.dk.

### Umsett eina bók

Mette Fønss hevur síðan skeiðini í Føroyum umsett bókina "The Easyway to Stop Smoking" saman við Alexander Elgurén. Danska heitið á bókini er "Endelig ikke ryger". Bókin er í alt umsett til 20 mál, og hevur selt yvir 4 millónir eintøk kring allan knøttin.

"Endelig ikke ryger" er komin á bókahillarnar í Danmark, og føroyingum verður eisini givið møguleika at ogna sær vælumtóktu bókina, tí hon verður eisini til taks í bókahandlunum í Føroyum.

Í Noregi liggur "The Easyway to Stop Smoking" nummar eitt á sølulistunum, og Mette Fønss er sum verða man spent um, hvussu bókin fer at verða móttikin í Danmark og ikki minst í Føroyum.

*Mette Fønss fer um mánaðarskiftið aftur at eggja føroyingum at leggja sigarettirnar á hillina.*





# Teitur fær góð ummæli



*Teitur Lassen tekur upp við góðum útsýni í Spania, meðan Rupert Hine lurtar*

*Mynd: Conny Jørgensen*

**Fyrstu ummælini, sum solofløgan hjá Teiti Lassen hevur fingið, eru góð. Teitur er eisini spakuliga farin at merkja, hvussu tað er at vera »stjørna« í USA og er noyddur at svara alskyns løgnum spurningum – eitt nú hvønn hann síðst klemmaði**

FLØGUÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*

Optimistisk og kenslu-borin, eru millum orðini, sum longu eru knýtt at fløguni hjá Teiti Lassen, ið bert hevur verið á marknaðinum í fáar tímar. Í gjár, 22. juli, gav Universal Records »Poetry and Aeroplanes« út í USA. Enn er ov tíðliga at siga, hvussu hon verður móttikin, men longu nú hevur okkurt rósandi ummæli verið at sæð.

Tónleikatíðarritið Slant Magazine er ikki pírið við stjørnunum til unga nýlingin úr Føroyum. Teitur fær fimm stjørnur av seks møguligum frá ummælaranum Sal Cinquemani, sum skrivar fyri blaðið.

– Borið av kenslum, væl ljóðblandað og hegnisliga søtað við skuggum av optimismu, spælir fyrsta solofløgan hjá Teiti Lassen sum eitt ljódligt postkort frá einum fjakkandi listamanni, sigur hann.

### Sorgblítt huglag

Blaðið hevur fingið fløguna frammanundan til ummælis og hevur sína greiðu fatan av, at talan er um góðsku. Farið verður ígjøgnum fleiri av løgunum, og tú situr eftir við kensluni, at tú átti at keypt fløguna sum skjótast.

– Hóast sangir sum »Sleeping with lights on«, ið byrjar ta annars akkustisku fløguna við villleiðandi hip-hop rútmum, eru ljósir og fangandi, so liggur eitt sorgblítt huglag undir allan vegin, skrivar Slant Magazine, sum sigur fløguna vera fulla av løtumyndum av longslinum hjá Teiti.

Blaðið samanber røddina hjá Teiti við hana hjá Jeff Buckley, eina av mongu fyrimyndunum. Víst verður eisini til, at íblástrarkeldurnar hjá Teiti munnu vera Suzanne Vega og James Taylor. Framleiðslan av fløguni, sum Rupert Hine hevur staðið fyri, er sevjumikil og fruktagóð, sigur Slant, men uppaftur týdningarmiklari er nærleikin í ljóðmyndini.

Upprunin hjá Teiti, sum blaðið sigur koma úr donsku oyggjunum Føroyum, fær eisini nøkur orð við á vegnum, og blaðið heldur, at fløgan er gjørd, meðan Teitur hevur havt hjartasorg.

Hvussu er og ikki. Teitur er farin á flog við fløguni »Poetry & Aeroplanes«, og næstu dagarnir, vikurnar og mánaðirnir fara at vísa, hvussu fløgan verður móttikin; um hon eisini selur.

### Føroyar sum drøgg

Í sambandi við útgávuna hevur Teitur úr at gera við konsertum og sonevndum »promotions«. Hann noyðist at vera burtur eina tíð, og fær eitt nú ikki heilsað upp á vinmenninar á ólavsøku, sum hann hevur havt fyri vana. Tað merkir eisini meira av tí longsli, sum fløgan er so full av.

Á heimasíðuni hjá tónleikastøðini VH1 er ein fesk samrøða við Teit. Sagt verður, at tað hoyrist á fløguni, at Teitur er langt heimanífrá og fløgan er fyri øll, sum hava følt, hvussu tað er at vera fremmandur í einum fremmandum landi, langt burturi frá teimum, sum tú elskar.

Spurdur, hvat hann saknar mest úr Føroyum, tá hann er burturi, svarar Teitur nakað soleiðis:

– Umhvørvið og luftina, sum tú andar í teg. Eg sakni mest fólkini. Tú venur teg við ymisk veðurløg og onnur fólk. Men eg kenna tað, sum eg havi heimstaðin undir húðini. Eg má vera har, og eg má koma aftur. Tað er sum drøgg, sigur Teitur Lassen.

Hann verður eisini spurdur, hvat tað løgnasta er, hann hevur sæð í USA.

– New York var ein skelkur. Tá eg kom til New York varð eg tikin á bóli. Alt her er bygt. Líkamikið, hvar eg eri (í Føroyum, blðm.), so síggi eg altíð havsbrúnna. Tú sært altíð havið og ert í náttúruni. Men her ert tú í sivilisatiónini. Tað er ein stórur munur á tí, sum eg komi frá, greiðir hann frá.

Hóast hann kanska leingist, so er hann kortini ikki púra einsamallur »over there«, tí við sær á konsertferðini hevur hann vinmannin og ljóðmannin úr Føroyum, Jónas Bloch Danielsen. Í samrøðuni avdúkar hann, at Jónas helst er tann síðsti, sum hevur fingið eitt klemm frá Teiti. Og so avdúkar hann forrestin eisini, at Thierry Henri er hansara yndisfótbóltspælari. Sig so tað.

## Fakta

Poetry & Aeroplanes
01. Sleeping With The Lights On
02. I Was Just Thinking
03. Youre The Ocean
04. Poetry and Aeroplanes
05. Josephine
06. One And Only
07. Rough Around The Edges
08. Let's Go Dancing
09. Amandas Dream
10. Shade Of A Shadow
11. To Meet You

## Keyp og hoyr á netinum

Fløgan hjá Teiti Lassen, sum kom út í USA í gjár, verður ikki at fáa í føroysku handlunum enn. Fløguhandilin 3-arin í SMS upplýsir, at fløgan ikki verður at fáa í Føroyum fyrr enn fyrst í september.
Eru fólk ótolin ber kortini til at ogna sær hana. Fleiri fløguhandlar eru, sum selja fløgur umvegis internetið og Teitur er eisini til sølu fleiri staðni. Teirra millum eru awarestore.com og vh1.com. Á teimum síðunum eru eisini samrøður við Teit at lesa og til ber at hoyra brot úr fløguni.

## Tinganes stongt

**Stjórnarskrivstova landsins hevur stongt í summar. Tað kemst av, at tørvurin á samskifti er nógv minni um summarið, sigur Barbara á Tjaldrafløtti, deildarstjóri.**

SUMMARFRÍ
*Ingi Rasmussen*

Einki samband er við skrivstovuna hjá Føroya løgmanni um summarið. Løgmansskrivstovan hevur stongt í tríggjar vikur og letur uppaftur 1. august. Sostatt tekur eingin telefonina á landsins stjórnarskrivsstovu. Víst verður kortini til eitt telefonnummar, og Sosialurin ringdi á nummarið, fyri at fáa eina frágreiðing.

Barbara á Tjaldrafløtti, deildarstjóri, tók telefonina. Vit spurdu hana, hví Tinganes steingir um summarið.

– Tað er fyri at fáa restina av árinum effektivari. Á hendan hátt sleppa vit undan, at summarferian breiðir seg yvir ein stóran part av árinum, sigur Barbara á Tjaldrafløtti.

Eisini Løgmálaráðið, sum hevur loyst frá løgmansskrivsstovuni, hevur stongt í hægstu summarferiutíð, og eftir ólavsøku fer Mentamálaráðið eisini í summarferiu. Einki verður svarað ella avgreitt.

Løgmansskrivsstovan royndi fyri fyrstu ferð í fjør at hava stongt í hægstu summarferiutíð, greiðir Barbara á Tjaldrafløtti frá.

– Hetta er eitt deydligt tíðarskeið. Telefonin ringir nóg illa hesa tíðina, landsstýrismenninir eru í feriu og aðrir stovnar, sum vit samstarva við, eru eisini í feriu. Nøkur eru kortini til arbeiðis hjá okkum, og vit uppgeva eisini altíð eitt telefonnummar, sum tú kanst ringja til, um tú hevur átrokandi boð, sigur Barbara á Tjaldrafløtti.

Eini 20 fólk starvast á Løgmansskrivstovuni.